Viðmerking:

# Stórur dagur

Viðhvørt kann tað vera eitt sindur ringt at síggja, um tað, sum vit fáast við nú, hevur nakað upp á seg yvirhøvur. Í longdini eru vit jú øll deyð, og sum Janus skald sigur: *Flestra manna lív er rit í moldum/ kámut søga, tá ið endar øld.*

Men tey av okkum, sum sóu fjølmiðlafundin eftir samráðingarnar í Keypmannahavn hósdagin tann 15. juni ár 2000, fara ongantíð at gloyma tað sum vit har sóu, tí hetta var ein hending av tí slagnum, sum fer at seta mark ímillum tað sum var og tað sum er.

Tað sum her hendi var, at føroyska tjóðin, sum í so nógvar øldir hevur verið forfjónað, reistist og segði, at nú eru tað vit sum gera av, hvat ið skal henda her. Danski forsætisráðharrin, sum síðan hann kom til, hevur hóreiggjað sær sum ein annar Gabel, var heilt skelkaður av tí fastleika, sum føroyska sendinevndin sýndi, og serliga av tí, at løgmaður var tann sum legði harðast á hann. Higartil hevur Nyrup jú hildið, at løgmaður í veruleikanum ikki meinar nakað sum helst av tí sum hann sigur. Vónin hjá danska forsætisráðharranum hevur verið, at Anfinn Kallsberg bert nýtir hesa samgongu fyri at reka vanligan flokspolitikk, og at alt fullveldistosið bert er taktikkur fyri at sleppa at varðveita valdið. Tí hevur Nyrup hildið, at hann ekkaleysur hevur kunnað lagt fótonglar fyri samráðingarnar, tí tað fekk ongar avleiðingar.

Men nú var annar glymur dansur í høll!

Danska stjórnin hevur alla tíðina vitað, at føroyingar hava íslendsku loysnina frá 1918 sum fyrimynd í tí loysn, sum skal finnast nú. Ein avgerandi partur av tí íslendsku loysnina var tann fíggjarliga uppgerðin millum partarnar. Henda loysn er best lýst í bókini hjá íslendska løgfrøðiprofessaranum Einar Arnórsson, sum í bók síni um tað fólkarættarliga sambandið millum Ísland og Danmark greiðir frá hesum viðurskiftum. Henda bók er týdd til danskt og kom út í Keypmannahavn í 1926. Frágreiðingin um fíggjarligu loysnina stendur í hesi útgávu á blaðsíðunum 101 - 107. Einar var sjálvur við til samráðingarnar, og tekur danski løgfrøðiprofessarin Knud Berlin undir við framløguni hjá Einari.

Fíggjarliga var í íslendska førinum hildið, at tað var ósømiligt, at Ísland sum eitt fullvalda ríki skuldi fáa pengar úr Danmark. Hin vegin var tað eisini ósømuligt, at tað skuldi kunna sigast um Danmark, at tað beinleiðis hevði vinning av at Ísland fekk sítt frælsi. Tí var tað, at danski staturin setti so nógvar pengar í tveir grunnar, at renturnar av hesum grunnum svaraðu til tað sum Danmark higartil hevði veitt til Íslands.

Tá landsstýrið á sumri 1998 boðaði frá, at tað hevði sett sær fyri at Føroyar skuldi fáa frælsi við at nýta tað íslendska fordømi, so var tað greitt hvat ið danska stjórnin skuldi gera. Tað var jú at finna fram til, hvussu stórar statsins veitingar til Føroyar vóru, hvat ið rentan er, og hvussu nógv ið tí skuldi koma í hesar grunnar.

At hetta fordømi er bindandi fyri donsku stjórnina er yvirhøvur einki at ivast í. Orsøkin til hetta er tann, at støða Íslands í mun til Danmarkar ríki var tann sama sum tann føroyska er nú. Í løgfrøðini ber tað ikki til at siga at vit hava eina loysn í dag og eina aðra í morgin í tveimum málum av sama slag, og tí er stjórnin bæði ríkisrættarliga og fólkarættarliga bundin at halda seg til hetta fordømi.

Tað ber tí til at fata avtaluna frá 10. juni 1998 sum ein donsk fráboðan um vælvild í so máta.

Tað sum so hendi í gjár var tað, at løgmaður krystallklárt boðaði øllum heiminum frá, at danir høvdu brotið tað lyfti, teir tann 10. juni 1998 høvdu givið, og at føroyska landsstýrið tí fór at fáa ein triðja part upp í hesar samráðingar. Hann nevndi enntá ST.

Tað er einki at siga til, at danski forsætisráðharrin var skelkaður og tosaði upp í saman. Sjálvandi royndi hann at siga, at tað ikki bar til at fáa ST upp í samráðingarnar. Hetta vil eitthvørt koloniveldi jú sleppa undan, men tað hevur ongum hjálpt higartil.

Danmark hevur nógv at missa við hesum føroyska útspæli, tí tað hevur nevnliga eitt ótrúliga gott umdømi í ST-skipanini. Danmark hevur ferð eftir ferð fordømt onnur koloniveldi fyri yvirgang og hevur virkað fyri frælsi hjá teimum kúgaðu tjóðunum. Allar tær tjóðir, sum hava vunnið



frælsið síðan ST varð skipað í 1945, hava altíð havt trygd fyri, at í Danmark hava tær ein góðan og trúfastan vin, og gevur Danmark eisini fíggjarligan stuðul til hesi fyrrverandi hjálondini.

Alt hetta góða umdømi kann rúka, nú føroyska landsstýrið sendir inn eina áheitan til ST um at koma upp í samráðingarnar við donsku stjórnina um at fáa Føroyum frælsi. Hetta veit Nyrup, og tí er einki at siga til at hann var skelkaður.

Hvørt hetta yvirhøvur verður neyðugt vita vit ikki enn. Sjálvur rokni eg við, at tá týdningurin av, at føroyingar ikki firnast fyri at taka hetta stig, fer at daga fyri donsku myndugleikunum, fara teir at lata skilið vinna á tí tápuleika, teir higartil hava sýnt í handfaringini av samráðingunum við føroyska landsstýrið.

Men tað avgerandi og søguliga er at løgmaður okkara hevur reist seg ímóti tí frekleika, sum Nyrup sum umboð fyri alt tað danska stýrið hevur sýnt tí føroysku tjóðini í hesum samráðingum. Hesum kunnu vit øll vera errin av, og vit kunnu vera vís í, at nú vendist ikki aftur til ta støðu, sum vit vóru í fyri tann 15. juni ár 2000.

Tí er øll orsøk hjá okkum at fegnast um henda framburðsdag.

**Zakarias Wang**

# Ósamdir bert til at vera ósamdir

Eg havi altíð hildið tað verið vánaligan politikk, tá menn eru ósamdir bert til at sleppa at vera ósamdir. Tað kann ikki bera til, at andstøðan einki finnur í uppleggum landsstýrisins, sum andstøðan kann vera samd við landsstýrið í. Tak bara dømið um oljupengarnar, sum landsstýrið bjóðar dønum. Hetta tók andstøðan undir við, tá Nyrup & Co fyri heilt stuttum tosaðu um júst hetta, at føroyingar skuldu gjalda aftur blokkstuðul v. m. tá olja var funnin. Hóast Nyrup í dag er ósamdur við sær sjálvum.

Tað undrar meg eisini, at blaðfólkið er so suttmint, at tað ikki dugir at lofta slíkum. Í maimánaði sigur Nyrup: Færinge skal selvfølgelig betale Danmark penge tilbage, såfremt der bliver fundet olie på Færøerne! Ein mánað seinni sigur hann: Der kan ikke blive tale om at inddrage olien .....

Og so loypur Lykketoft framav við at avdúka tað, sum stjørnin alla tíð hevur havt í hyggju: Hvis det viser sig, at Færøernes økonomi er på højde med eller bedre end Bornholms økonomi, så vil støtten blive fjernet helt af sig selv! Og Føroyar liggja oman fyri Bornhólm búskaparliga.

Tí havi eg so ilt at skilja, at javnaðarmenn og sambandsmenn ikki hava annað at koma við, enn at teir undir øllum umstøðum skulu vera ósamdir við landsstýrið. At føra valpropaganda í slíkum tíðum, er einki minni enn býtt og tekin um, at menn ikki eru serliga búnir til at røkja starvið sum fólkavaldir.

Eg havi altíð havt stóra virðing fyri Jóannesi Eidesgaard, men so tápuligur, sum hann ger seg í hesum máli, trúgvi eg neyvan hann er. So hevði verið gott at vitað, hvat Jóannes veruliga ætlar. Lykketoft hevur jú sagt, at vit missa blokkstuðulin undir øllum umstøðum.

**N-Jón Ellendersen**
**Vingetoften 18**

**Sosialurin**

*eisini á www.sosialurin.fo*

# Atlantic Airways forar fyri príslækking

Ársøkin til, at føroyingar skuldu fáa egið flogfar, var ikki, at uppbyggja eitt veldugt bureaukrati, men m.a. fyri at fáa kapping á føroyaleiðini, soleiðis at ferðaseðlaprísurin skuldi fara niður. Men tað skilst á øllum brøgdum, at hetta er ikki fallið í góða jørð hjá føroyska kappingarneytanum? Heldur enn at taka væl ímóti kapping, roynir Atlantic Airways, at fáa landsstýrið at fora fyri príslækking, sum hin parturin, Mærsk Air, nú í óvísum tíðarskeiðum bjóðar viðskiftafólkinum, og sum ætlanin ivaleyst er at víðka til, at umfata onnur sløg av ferðaseðlum eisini.

Var talan um teir, sum byrjaðu at arbeiða felagið upp úr ongum, hevði verið lættari at skilt eina mótreaktión, men ein leiðsla, sum er komin til skorin klæðir, og hvar ferðafólkið er økt ár undan árið til tað størsta nakrantíð, er øll grund at halda: - Illa er húsast. Hevur Altantic Airways ikki ráð til munandi príslækking, nú bæði landskassin og framtaksgrunnurin hava oyst tíggjutúsundtals milliónir í felagið, afturat tí rekord høga ferðafólkastreyminum, nær verða so ráð til tað? Tey títtu tíðingaskrivini, ið felagið sendur Útvarpi Føroya um, hvussu framúr væl tað gongur hjá felagnum, munnu undra mangan mann.Tú hoyrir ikki aðrar fyritøkur bera seg soleiðis at í loftmiðlunum:

Hygg, vit hava keyp eitt flogfar afturat! (eitt gamalt flogfar, sum kortini einki fíggjarligt grundarlag er fyri at hava í føroyaflúgvingini uttan í háárstíð).

Núverandi flogfar megnar ikki at flyta alt ferðafólkið, sum flýgur millum londini!

Vit hava upprættað nýggjar leiðum og økt um túratalið!

Lutfallsliga flýgur felagið nógv fleiri ferðandi enn kappingarneytin! o.s.f. o. s. f.

Hví alt hetta reypið?

Munnu hesi tíðindaskriv ikki heldur vera send út í einari desperatari støðu, fyri at hava okkurt at fortelja polittikarunum og tí vanliga føroyinginum?

At prísirnir eru órýmiliga høgir, kann éitt nú lýsast soleiðis: Fyri sama prís, sum tað kostar einum føroyingi at flúgva til Danmarkar við Atlantic Airways, kann ein heil familja á evropeisk meginlandinum ferðast til støð á hinari jarðarhálvuni.

**John S. Myllhamar**

# Suðuroy og Hergeir Nielsen

Fleiri tjóðveldispolitikarar hava í nýggjari tíð fingið ein ógvuliga ódámligan vana afturat nógvum øðrum, at teir siga, at teir eru lýtaleysir meðan øll onnur, sum ikki taka undir við teirra sjónarmiðum og ikki gera, sum teir siga,hava ábyrgdina av støðuni í Føroyum ídag.

Ein av hesum politikarum er Hergeir Nielsen (HN) valdur á ting í suðuroy, sum í dimmalætting 7-6-2000 í einari ósakligari grein, sum sigur alt um, hvat maðurin stendur fyri,gevur andstøðuni og sakleysum persónum í umsitingini á SL alla ábyrgdina av tí vánaligu samferðslu, sum suðuroy hevur við meginøki ídag.

Hevði HN verði ein líka frægur politikari sum onkur annar samgongutinglimur, so hevði støðan viðvíkjandi samferðslu til Suðuroy og støðan á Suðuroyar sjúkrahúsi kanska verið ein onnur í dag.

Skrivaða orðið í samgonguskjalinum er eitt, veruleikin er eitt heilt annað. HN er hóast alt partur av verandi samgongu, men kemur bert við undanførslum, um hví hann einki ger fyri tað valdømi, hann er valdur í. Harafturat er HN nokk tann einasti suðringur sum trýr uppá landsstýrismannin í samferðslumálum.

HN kemur eisini fram við tí gomlu ætlanini um ferðasamband yvir Sandoy, so at suðringar „bert“ skulu brúka 4-5 tímar um at koma til miðstaðarøkið. Er tað hatta samgongan kann bjóða suðringum, so sær illa út fyri okkum,sum búgva í Suðuroy.

At eitt nýtt skip til suðuroyarsiglingina skal til, er ikki tí HN ella samgongan vil tað, men meira vegna altjóða skipskrøv.

At HN leggur eftir andstøðuni er vantandi, men at geva øðrum ábyrgdina av nøkrum, sum ein sjálvur hevur ábyrgd av, tá er mann langt úti og vísur bert máttloysi hjá HN.

**Finnleif Guttesen**
**Tvøroyri**



# Realurin: 20 mió. í avlopi

*Realkreditstovnurin hevði góðar 20 mió. í avlopi í fjør og hevur nú eina eginogn, sum er knappliga eina hálva milliard. Í fjør veitti stovnurin nýggj lán fyri knappar 232 mió. krónur og samlaðu útlánini eru nú góðar 412 mió. krónur*




*Í fjør veitti Realruin nýggj lán fyri knappar 232 mió. krónur*

SVEINUR TRÓNDARSSON

Ársroknskapurin hjá Føroya Realkreditstovni varð almannakunngjørdur um dagarnar og úrslitið hesaferð var eitt avlop upp á góðar 20 mió. krónur. Hetta er nakað væl lægri enn tað var árið fyri, tí tá var avlopið knappar 30 mió. krónur.

Orsøkin til niðurgongdina er tann, at Realurin hesaferð hevur eitt staðfest kurstap av sølu av virðisbrøvum upp á góðar tvær milliónir. Seinasta ár hevði stovnurin kursvinning av sølu av virðisbrøvum upp á góðar tríggjar milliónir, so her er ein munur upp á góðar fimm milliónir, sum ger úrslitið verri.

Roknskaparárið 1998/99 afturførdi stovnurin 5 milliónir í fyrr avskrivaðum útlánum, og tað ávirkar úrslitið positivt. Seinasta roknskaparár hevði Realurin ongar slíkar afturføringar og tí verður ársúrslitið 5 mió. verri av teirri orsøk.



*Atli P. Dam, leiðari í Realinum*

Samanlagt gevur hetta eina niðurgongd í úrslitinum upp á umleið tíggju milliónir og tað er hetta, sum ger tann stóra munin í ársúrslitinum sammett við árið frammanundan.

Annars hevur Realurin fingið gongd aftur á útlánsvirksemi. Tað hevur verið sera soltið við nýggjum skipum í Føroyum seinastu nógvu árini, men í fjør veitti Realurin nýggj lán fyri íalt knappar 232 milliónir krónur. Henda upphædd er spjadd út á 14 nýggj lán, men tað er lítið at ivast í, at Krúnborg, eigur bróðurpartin av hesum peningi.

Samstundis, sum stovnurin veitt 14 nýggj lán, umfíggjaði hann eisini 14 gomul lán. Tey svara til eina upphædd upp á góðar 122 mió. krónur.

Við hesum broytingum hevði stovnurin eina samanlagdan høvuðsstól upp á góðar 546 mió. krónur. Við avdráttum og afturgoldnum lánum eru hesi lán komin niður á góðar 412 mió. krónur, sum er umleið 169 milliónir meira enn seinasta roknskaparár.

Sum sagt seldi Realurin burturav virðisbrævagoymsluni í fjør, og tað sæst eisini í fíggjarstøðuni. Tá roknskaparárið endaði 31. marts í ár átti stovnurin knappar 171 milliónir í virðisbrøvum, móti 277 mió. árið frammanundan. Hesum er einki óvanligt í, tí stovnurin — sum sagt frammanundan — hevur veitt nógv nýggj lán. Samstundis, sum stovnurin hevur selt burturav virðisbrøvunum hevur hann eisini upptikið nýggj lán fyri íalt 100 milliónir.

Annars er tað at leggja afturat, at Føroya Realkreditstovnur er væl konsolideraður stovnur. Hann hevur eina eginogn, sum er upp á eina knappa milliard krónur, og tað svarar til umleið 81 prosent av samlaðu ognunum. Hinvegin má stovnurin staðfesta, at tað er smátt við rentuni av hesum peningi, tí eginpeningsavkasti fyri seinasta roknskaparár var bert góð 4 prosent. Hetta er ikki nógv, men sammett við rentuna í landinum er tað á eini brúkiligari leið.

Eginpeningsavkasti hongur sjálvandi eisini saman við samlaða útlánsaktivitetinum hjá stovninum og tí eru útlit til, at avkasti fer at hækka eitt sindur komandi árini. Um tað so kemur upp á støði tað var á í 1995/96 er tó ilt at siga. Tá var eginpeningsavkastið 13 prosent, og tað er ikki so lítið.

Seinasta roknskaparár var annars tað fyrsta eftir at nýggja lógin, sum gevur Føroya Realkreditstovni víðkaðar útlánskarmar. Ùtyvir at kunna lána 50 prosent til fiskiskip, kann stovnurin eisini lána meira yvir eitt longri tíðarskeið, sum annan veðrætt. Harumframt hevur stovnurin eisini fingið víðkað virkisøkið til eisini at umfata ali- og frálandavinnuna, samstundis sum hann hevur fingið loyvið til at fíggja eina avmarkaða nøgd av serinnflutningsførum. Hetta hevyr við sær, at stovnurin á jøvnum føti við aðrar fíggingarstovnar kann bjóða út lán til einstakar stórar verkætlanir umfatandi fiskifør til veiðu av pelagiskum fiskasløgum og rækjum.

Alt hetta økir um virksemi hjá Føroya Realkreditstovni og tað hevur millum annað við sær, at stovnurin hevur givið tilsøgn um lán upp á umleið 200 mió. krónur, og hesi væntast at koma til útgjaldingar í hesum roknskaparárinum ella næsta, verður sagt í ársfrágreiðingini.

Viðmerking:

# Blokkurin burtur kortini

Eftir sonevndu samráðingarnar 15. juni er greitt, at valið hjá føroyingum ikki stendur millum fullveldi við 4 ára skiftistíð ella heimastýri við donskum pengum.

Valið stendur ímillum fulla ábyrgd við greiðum búskaparligum treytum ella framhaldandi heimastýri við óvissu um, nær blokkurin hvørvur.

Eftir tað sonevnda 3. samráðingarumfarið má standa øllum føroyingum greitt, at vit eru í eini óvirðiligari og mannminkandi politiskari støðu.

Endaleysa tosið um, at vit eru í einum sonevndum ríkisfelagsskapi við javnbjóðis virðing hvør fyri øðrum, er enn einaferð avdúkað sum ein stórur sjónleikur: Sum einfalt gykl. Alt valdið liggur jú bert einastaðni — nevniliga hjá donsku ríkismyndugleikunum:

- Avtalur verða brotnar, tá tað hóvar tí partinum, sum hevur tað politiska valdið

- Danska stjórnin vil ikki samráðast og vil ikki grundgeva fyri eini búskaparligari uppgerð millum Føroyar og Danmark

- Hon noktar at samráðast við eitt demokratiskt valt føroyskt landsstýri, sum hevur hildið allar avtalur um samráðingarnar út í æsir. Ístaðin stuðlar stjórnin beinleiðis andstøðuuppskotum í Føroyum

- Hon sendir eitt bræv ”til den færøske befolkning” (ikki til ”det færøske folk”), har róð verður framundir, at føroyingar skulu velja ein aðra loysn enn hana, sum landsstýrið roynir at samráða seg til, og har beinleiðis skeivleikar verða førdir fram. Eitt nú um føroyska skattatrýstið. Hetta verður gjørt, hóast alt tos um ikki at leggja seg út í føroyskar avgerðir.

Blokkurin burtur kortini

Tó er ein sera týdningarmikil sannroynd komin á borðið eftir seinasta samráðingarfund. Danska stjórnin upplýsti, at um hon metir, at um føroyska livistøðið mált í bruttotjóðarúrtøku pr. íbúgva verður hægri enn ”i Syddanmark”, sum hon málbar seg, so verður blokkstuðulin at minka kortini. Samstundis førdi hon fram, at Føroyar longu eru ájavnt ella hægri enn tildømis Bornholms Amt.

Henda politiska staðfesting, sum síðani er endurtikin av framsøgumanninum hjá javnaðarflokkinum í Danmark, er sera týdningarmikil. Hon sigur okkum so mikið, at valið ikki stendur millum fullveldi og eina 4 ára skiftistíð ella heimastýri við fullum blokki..

**Valið stendur ímillum:**

5. Fulla ábyrgd og sjálvræði við eini møguligari stuttari skiftistíð.

6. Ella framhaldandi heimastýri uttan fult sjálvræði, uttan fulla ábyrgd og við møguligari eins stuttari skiftistíð.

Tað fyrra merkir greiðar linjur og at vit vita, hvat vit hava og skulu miða eftir.

Hitt seinna merkir ongar fastar karmar og møguligar stórbroytingar uttan at vit sjálvi hava tikið stig til tað ella kunnu stýra gongdini. Tá vita vit als ikki, hvat vit hava og hvørjum vit skulu stýra eftir.

**Fullføra fullveldisætlanina**

Tí er neyðugt at gera støðuna upp, og landsstýrið er samt um hesi stig:

7. Vit royna at fáa ein triðja part uppí, til tess at gera samráðingarnar lidnar og fáa ein endaligan sáttmála uppá pláss. Hetta verður tó sera trupult, um Danmark



noktar.

8. Vit samráðast liðugt undir øllum umstøðum og royna at fáa ta frægastu skiftistíðina. Fundur skal vera í Føroyum, skjótast gjørligt eftir summarfrítíðina, har hetta verður avgreitt.

9. Vit halda fólkaatkvøðuna við passaligum skotbrái til upplýsing og valstríð, eftir at sáttmálin er liðugur og løgtingið hevur samtykt hann

10. Vit gera innanhýsis politisk framtøk, ið framhaldandi skulu tryggja gongdina til ein sjálvberandi búskap:

- Búskapargrunnur verður stovnaður sum skjótast, har tað, ið ikki verður brúkt av blokkstuðlinum, verður sett, og sum er klárur til møguligar komandi oljuinntøkur og aðrar óvæntaðar inntøkur

- Vit halda fram at gera sjálvstøðuga lóggávu á øllum økjum: Føroyska grundlóg, rættarskipan, løgreglu, útlendingalóggávu o.s.fr.

- Vit halda fram at gera neyðugar íløgur í eitt føroyskt vælferðarsamfelag, sum byggir á ein sjálvberandi búskap

**Høgni Hoydal**
**Landsstýrismaður í sjálvstýrismálum**